# Nútímans bilhús í Klingrugarði í Klaksvík

**Leygardagin letur Reyni Service upp í nýggjum, stásiligum bygningi í Klaksvík**

BILASØLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nýggi bygningurin hjá Reyni Service í Klaksvík er 700 fermetrar til víddar, og har er pláss fyri fimm, seks bilum í framsýningarhølinum, ið eru sera ljós og snotulig.

– Á verkstaðnum er somuleiðis pláss fyri eini seks bilum, og verkstaðurin hevur alt tað nýggjasta innan biltøkni, sum krevst í dag fyri at kunna klára allar mekaniskar og tøkniligar uppgávur, sigur Eivind av Reyni, stjóri hjá Reyni Service.

Í bygninginum í Klaksvík verður eisini høvi at fáa bilin »TidyCar« viðgjørdan.

Í sambandi við, at flutt verður í nýggju hølini, verður móttøka í hølunum leygardagin kl 14, har Monika Stauss og Dánial Eyststurstein spæla. Eisini verða røður og sangur á skránni, og øll eru vælkomin, sigur Eivind av Reyni.



*Nýgtgi bygningurin hjá suto Reyni Service í Klaksvík. Pláss verður fyri eini seks bilum í framsýningarhølunum, verkstaðið er útgørt við nýggjastu tøkni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Mánadagin byrja so arbeiðsdagurin í nýggju hølunum, og tá verða eisini spennandi tilboð upp á nýggjar og brúktar bilar, eins og tilboð frá TidyCar og verkstaðnumm, sigur Eivind av Reyni.

Í síðstu viku keypti Eivind av Reyni alt virksemið frá P/F Meinhardt Arge, sum umboðar bilmerkini Opel, Nissan, Peugeot og Saab. Nýggja bilasølan hevur fingið heitið P/F Auto Service.

Men verða hesi merki eisini at fáa í nýggju hølunum í Klaksvík.

– Nú kom hetta so brádliga í lag. Hølini í Klaksvík eru bygd sum Toyota høli, men vit fara at veita bilmerkjunum hjá Auto Service alla tænastuna á nýggja verkstaðnum, sigur Eivind av Reyni.

Hann sigur eisini, at um onkur kundi í Norðoyggjum vil síggja onkran av bilunum hjá Auto Service, so senda teir bilin norður uttan trupulleikar.

Enn er ógreitt, hvussu verður í framtíðini, men tað verður so í øllum førum eitt samstarv millum Auto Service og Reyni Service í Klaksvík, sigur Eivind av Reyni.

Øll starvsfólkini í gomlu deildini hjá Reyni Service í Klaksvík, sum hevur hildið til í leigaðum hølum, fara at halda fram í nýggja bygninginum. Men Eivind av Reyni væntar, at virksemið fer at økjast og væntar, at brúk verður fyri einum ella tveimum monnum afturat – serliga havandi í huga útlitini, nú Norðoyatunnilin letur upp og samstarvið við Auto Service.

**Fyri eina heilsølu í Tórshavn søkja vit eftir**

**Goymslufólki/bilførara.**

***Arbeiðið umfatar:***
Goymsluarbeiði
Útkoyring av vørum kring landið
Kundatænastu/avgreiðslu

***Førleikakrøv:***
Handilsskúla
Koyrikort
Fyrikomandi
Evni til at arbeiða sjálvstøðugt
Góð samstarvsevni

***Starvið:***
Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum er fjølbroytt og áhugavert.
Góð løn verður boðin rætta fólkinum.

Áhugað verða biðin um at senda skrivliga umsókn við viðkomandi prógvum til:

SP/F Grannskoðaravirkið
Hermund Jacobsen
skrásettur grannskoðari
Postboks 16
FO-110 Tórshavn

**Jólagávublaðið frá Nettorginum er at fáa í øllum handlum FK**




**Lættari, hugaligari, høgligari...**
**Keypið/bíleggið jólagávurnar í FK nú!**
Gjørt verður vart við, at prísbroytingar kunnu vera á nøkrum av vørunum í blaðnum